# Mentanarsamskifti millum Føroyar og Hetland

Í døgunum 8. til 12. september vitjaðu tónleikanæmingar úr Suðuroynni í Hetlandi, har teir vitjaðu ungar tónleikanæmingar. Ferðin eydnaðist væl og møguliga spyrst meira burtur úr mentanarsamstarvinum. Her er ein ferðafrásøgn og inn eru flættaðar nakrar hugsanir hjá onkrum av teimum, ið vóru við











TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Ein savnan av tónleikanæmingum í allari Suðuroynni hevur fingið heitið Suðuroy Concert Band. Hesin bólkur vitjaði í døgunum 8. til 12. februar í Lerwick í Hetlandi.

Eftir 12 tímar við Norrønu, náddu øll 74 í ferðalagnum til Lerwick í Hetlandi. Ein stásiligur og sera reinur býur í miðaldarstíli.

Fyrst tók nýkomna ferðalagið tað stillisliga. Foreldrini, ið vóru við, gjørdu eina góða máltíð á sera góða vallaraheiminum.

Ein kann gerast bilsin av at síggja, hvussu nógv ferðafólk vitja í Hetlandi og hugsanin kemur til ein, um ikki hetta eisini ber til í Føroyum í sama mun.





## Konsert

Leygardag var konsert saman við ungdóms bigbandinum í Lerwick. Eitt vælspælandi band og teirra sangarinna var ein nýggj Norah Jones, ið sang sum ein dreymur. Konsertbólkurin úr Suðuroynni varð væl móttikin og spældi uppá tað besta higartil. Og Brandur Enni var odda við óføru rødd síni.

Sunnudag spældi bólkurin úr Suðuroynni innan guðstænastu í St. Columbia Church og á skránni var eitt stykki úr oratorium eftir Handel, Judas Maccabæus, saman við urguni í kirkjuni.

## Mentamálaráðharrin fegnaðist

Sjálv guðstænastan var nakað av eini uppliving fyri vitjandi føroyingarnar. Ein óvanliga fríur og óstrongdur háttur, við m.a. einum orðaskifti millum føroysk og hetlendsk børn, hvør á sínum máli. Løtan gjørdist eitt njótilsi, eisini hjá teimum, ið ikki høvdu væntað sær hetta.

Aftaná hittu føroyingarnir mentamálaráðharran í Hetlandi og hann fegnaðist um og var stak áhugaður í hesum mentanarsamskiftinum millum londini bæði.

## Sameind tónleikaoyggj

Føroyska ferðalagið hevur minnini eftir frá einum túri, ið riggaði væl, og har vitjað varð hjá fryntligum og blíðum vertsfólkum Ferðina løgdu foreldrabólkurin og forkvinnan har, Eileen Michelsen, og tónleikalærarin Ulf Nordlund tilrættis.

Eftirmetingin er, at tónleikabólkurin Suðuroy Concert Band, ið telur 45 leikarar, er bólkurin, ið kann umboða eina savnaða Suðuroyggj.

Næsta uppgáva hjá bólkinum verður væntandi, tá nýggi Smyril kemur til Føroya.

*Myndir: Pauli Poulsen*